# Ernst Hansen 75 ár



Mikudagin 6. september fylti Ernst Hansen á Toftum 75 ár. Ernst hevur verið frammarlaga í kommunupolitikki, í vinnulívinum og í missiónini í heimbygdini.

Ernst er ættaður úr Gerðinum á Nesi. Foreldrini vóru Elspa og Tummas Hansen í Gerðinum. Tey fingu tólv børn: Mette Helena (1922 +1923), Manella (1923 +1924), Hansa (1925) í Skipton í Onglandi, Mads Nesá (1926 +1981) á Nesi, Hertha Johannesen (1928) Eysturi í Líð á Nesi, Margith Joensen (1929) á Nesi, Ernst Hansen (1931), Inger Mikkelsen (1933) á Toftum, John (1936) í Havn, Emma (1937) í Reykjavík, Gerda (1939 +1943) og Dagny Weihe (1941) á Glyvrum. Gert (1943) vaks upp sum beiggi í systkinaflokkinum. Hann býr í Runavík.

Ernst fór blaðungur tíðliga til skips. Hann hevur havt góð likamsevnir og var raskur fiskimaður. Spennandi og mennandi var skeiðið eisini, tá ið Ernst var við skúlaskipinum Danmark Meðan Ernst gekk upp á skúla, búði familjan, sum tá taldi konu og tvey børn, í Havn. Ernst leyk stýrimansprógv á Føroya Sjómansskúla í 1955. Í nøkur ár sigldi hann úti sum stýriamaður við Mærsk

Hugurin til sjógvin og siglingina á heimshøvunum var stórur, men tað lagaði seg soleiðis, at lívsstarvið varð á landi.

Ernst var við til at fáa flakarvirkið Nyk til Toftir, og hann var stjóri har frá byrjanini síðst í seksti árunum og inntil felagið gavst undir kreppuni miðskeiðis í níti árunum. Ernst hevði handil í kjallaranum heima við hús, hann var reiðari, og hann hevði fleiri álitissessir innan vinnulívið. Eitt nú var hann eitt skifti formaður í Føroya Fiskasølu.

Tey seinnu árini plagdi Ernst at loysa havnarumsjónarmannin á Toftum av, hann hevði bát og róði út.

Tá ið gamla Nes sóknar kommuna í 1967 fór í søguna, gjørdust Nes, Toftir og Saltnes til Nes kommunu. Ernst, sum hevði verið kommunustýrislimur í gomlu kommununi, var fyrsti formaðurin í Nes kommunu, og í tí sessinum sat hann fram til ársenda 1976. Hesin sessurin bar aðrar uppgávur við sær. Eitt nú var Ernst nevndarlimur og formaður í nevndini fyri Kongshavnar Havn, sum kommunurnar kring Skálafjørðin mynda og fyri Skálafjarðar Sløkkilið.

Ernst hevur altíð verið trúgvur í kirkjuni og missiónshúsinum. Hann hevur í mong ár verið og er stýrisformaður í missiónshúsinum Thabor á Toftum, hann hevur verið limur og formaður í kirkjuráðnum, hann var uppi í landsfelagnum fyri Bláa kross í nógv ár, og hann var í fleiri ár ein av deknunum í Nes kirkju og Fríðrikskirkjuni á Toftum.

Ernst er giftur Kate fødd Højgaard og ættað innan av Regni á Toftum. Tey búgva á Toftum, og tey eiga fimm børn: Marita Dalsgaard (1952) á Glyvrum, Tummas (1957) í Keypmannahavn, Krista Magnussen (1962) á Nesi, Eyðun (1966) í Hoyvík og Kaj Eli (1975), sum býr heima hjá foreldrunum.

Hóast heilsan hesi seinastu árini ikki hevur verið so góð, sum hon annars hevur verið, so bar tað Ernst til føðingardagin at heilsa upp á nógv fólk, sum komu á gátt hjá dóttrini úti í Forná á Nesi, har føðingardagurin varð hildin.

J

†

## Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Estrid Nielsen, Tvøroyri** fer úr kapellinum á Tvøroyrar Sjúkrahúsi fríggjakvøldið kl. 18. Jarðarferðin verður leygardagin kl. 13 úr Tvøroyrar kirkju. Tey, ið vilja minnast Estrid kunnu lata Missiónshúsinum á Tvøroyri eina gávu.

**Arne Jespersen, Tvøroyri** andaðist týsdagin 5. september, 62 ára gamal.

## Tøkk

Hjartans tøkk til tykkum øll, sum gjørdu mær 90 ára føðingardagin 26. august so minnisríkan.
Tøkk fyri gávur, fjarrit, teldupost og blómur.
Tøkk fyri telefonsamrøður og talur.
Tøkk til tykkara ið hjálptu so væl til.
Tøkk til Betesdakórið og hugnaløtuna har. Tøkk til kingosangararnar úr Tjørnuvík, sum kveiktu gomul minni fram. Tað var hjartanemandi.

Harrin signi tykkum øll.

**Jógvan Gerðalíð**

# Hákun Mortensen 75 ár

Sunnudagin 10. september fyllir Hákun Mortensen rør- og blikksmiður í Havn 75 ár.

Hákun er havnarmaður, og hevur hann alt sítt vaksna lív arbeitt sum rør- og blikksmiður. Hann fór sum 14 ára gamal í læru hjá P/F Mariu Poulsen, har hann arbeiddi í mong ár. Tey seinastu nógvu árini hevur hann arbeitt sum sjálvstøðugur, og er hann framvegis virkin.

Handalagið er gott, og Hákun trívist best, tá hann hevur okkurt at gera. Í frítíðini íðkar hann fimleik hjá Havnar Fimeikafelag, hann ger eisini grindaknívar, smúkkur og flaggstengur úr beini og ymiskt annað. Honum dámar væl at ganga túrar og at ferðast. Hann hevur t.d. verið við á oyggjaleikunum nakrar ferðir og eisini verið manga bussferðina uttanlands.

Hákun er ein persónligheit og ein býarmynd í Havn - er ofta í føroyskari húgvu ella í keppi. Hann er lættur at koma á tal við, er hittinorðaður og dugir væl at taka til.

Eisini er hann ein íðin HB-viðhaldsmaður og er til flestu dystirnar hjá HB, bæði í Havn og aðrastaðni í landinum.

Hákun er næstyngstur av teimum 12 børnunum hjá Helenu, f. Mouritsen, og Thomas Juel Mortensen í Havn. Raðfylgjan er hendan: Mourits, Óli, Maren Susanne (Marsanna), Jona, John Sofus (Jon), Jens Wenningsted (Wenna), Arne, Ebbe, Finn, Helgi, Hákun og Anna Louisa. Av hesum eru bert trý tey yngstu eftir á lívi.

Hákun er giftist Hjørdis, f. Petersen úr Kollafirði. Tey eiga døturnar Elsebeth og Dianu. Barnabørnini eru seks í tali.

Føðingardagurin verður hildin leygardagin 9. september hjá dóttrini, Elsebeth, Millum Gilja 32 í Hoyvík frá kl. 17.



## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu,
tá okkara góði sonur, bróður og pápi

**Hans Jørgen Jensen**
tannlækni, Hvalvík

doyði og fór til gravar.

Tøkk til Martin R. Jacobsen, prest, fyri vøkur orð.
Tøkk fyri vitjan og tykkum sum ringdu,
til gravarar og til tykkum, sum hjálptu til við ervinum.
Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu Hans Jørgen
til hansara seinasta hvíldarstað.

*Fyri tey avvarðandi*

**Anna, Anker, Nicolaj, Anna og Njál v/ familju**

**Føðing**

19. august fingu Nikolina Niclasen og Halldur á Húsamørk, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3600 gr.



Mánadagin 21. august fingu Tór Marni og Ronja henda fitta beiggjan. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4400 gr. Foreldrini eru Berit W. Hansen og Jóannes Weihe, Tórshavn.



**Dagurin í morgin**

**9. september. Gorgonius**, deyður umleið ár 300. Ein av pínsluváttunum í fornkirkjuni, sum varð tikin av døgum undir Diocletianus keisara.

**10. september. Burchhardt**, deyður umleið ár 754. Munkur úr Wessex í Onglandi. Hann fór seinni sum trúboðari til Galliu og endaði sum biskupur í Würtzburg í Týsklandi

**11. september. Hildibjartur**. Føroyskt navn fyri Hillebert, sum var biskupur í Tours í Fraklandi og doyði í 1134. Upprunaliga týskt navn, ið merkir stríð og bjartur.